# Royna n‡ggj alibrúk á streymasjógvi

*Alistø›in Navir fer at leggja n‡ggja aliskipan út á streymasjógvi út fyri Ørgusgjógv í Vágum. Skipanin er ongantí› fyrr roynd í Føroyum*

*Navir eigur ein av teimum trimum aliflakunum sum fyrr í vikuni komu til Føroya*

EDVARD JOENSEN

Í Nesinum:
Ein n‡ggj aliskipan ver›ur løgd út á streymasjógvi út fyri Ørgusgjógv í Vágum. Hon skal vera klár innan fyrsta november og skal virka sum ein royndarskipan í vetur.

Alifelagi› Navir í Nesinum hevur alibrúk á Vestmanna, Kvívíksmegin, innan fyri Gassá. Ta› er rættiliga trongt á Vestmanna, og nú fara teir at royna heilt n‡ggjar lei›ir, sigur Hávar›ur Jensen, sum arbei›ir á stø›ini.

Hendan skipanin, teir nú fara at leggja út, hevur veri› roynd í Írlandi eina tí›. Menn frá Navum hava veri› í Írlandi og kanna› skipanina fyri at vita, um hon møguliga kann brúkast í Vestmannasundi. Hon royndist væl, láta teir at, men har rak tó ikki so hart sum í Vestmannasundi. Streymmátingar hjá Landsverkfrø›inginum hava víst, at í Vestmannasundi rekur vi›hvørt einar 2,7 míl, og ta› skal n‡ggja skipanin klára.

Men skipanin er eisini roynd í Kanada, og har rekur rættiliga hart, siga teir. Navirsmenn hava veri› í Kanada, og teir tykjast nøgdir vi› royndirnar ha›ani. So nú ver›ur ein stø› flutt til Føroya og løgd út í Vestmannasundi.

Hetta er stórt annlegg. 20.000 kubikk, sum er nógv størri enn teir stóru Bridgestone ringarnir, sum føroysk alibrúk annars hava. Teir eru12.000 kubikk.

N‡ggja skipanin er gjørd á tann hátt, at sett eru hálvanannan tumma rør ni›ur, sum nótirnar ver›a spentar ímillum. Á tann hátt ver›a tær standandi fastar og fara ikki vi› streyminum, sum annars hendir, tá tær hanga leysar.

At ala á streymasjógvi ger tó, at fiskurin ikki má vera ov lítil, tá hann ver›ur settur út. Rokna› ver›ur vi›, siga teir, at hann skal viga eini 100 gram, tá sett ver›ur út í streymannleggini.

Skipanin fyri Ørgusgjógv skal, sum sagt, liggja klár tann fyrsta november. Ta› ver›ur helst ikki full skipan slept í hana beinanveg, ver›ur sagt av Navum. Einar 30.000 fiskar rokna teir vi› at sleppa í. Veturin ver›ur so brúktur til at royna, hvussu ta› ber til at ala har.

Eftir royndunum í Kanda og Írlandi siga teir, at skipanin tolir at kalla alt ve›ur. Slepst bara til at fó›ra fyri aldu, er einki í vegin hjá skipanini at liggja, vísa royndirnar.

Øll loyvi til at leggja skipanina út fyri Ørgusgjógv er langt sí›an fingin til vega. Seinnu tí›ina hava boyur ligi› á økinum.

Navir eigur ein av teimum trimum aliflakunum, sum norskur sleipari kom á Hvalvík vi› fyrr í vikuni.

Talan er um ein flaka, sum er bygdur sum eitt skip. Í stødd er hann á lei› sum Sam. Einar 30 metrar langur og kostar umlei› 3,2 milliónir krónur.

Flakin er ætla›ur at liggja vi› aliringarnar og er útgjørdur vi› brunnum at fylla fó›ur í.

Alistø›in Navir hevur fó›urskipan vi› pumpum úr landi. Ta› er solei›is, siga teir á Navum, at teir ytstu ringarir liggja eina 800 metrar úr landi, og pumpiskipanin hevur vi›hvørt trupulleikar at fáa fó›ri› út til ringarnar. Serliga tá heitt er um summari›, kann l‡si renna úr fó›rinum, og so typpast slangurnar, tí tær eru ov langar. Tí er hesin flakin keyptur.

Flakin kemur úr Noreg, har hann er gjørdur li›ugur. Sandblástur og mála›ur. Men annars er sjálvur skrokkurin smí›a›ur í Letlandi.

# Einki fó›ur yvirhøvur

*Ein tungtvigandi grund til, at neytini vór›u flutt úr fámara, var, at einki strá› er sligi› á gar›inum í summar*

EDVARD JOENSEN

Í greinini um flutning av neytunum í Fámara var› nevnt, at illa bar til at flyta fó›ur til fjósi›. Stjórin á Jar›arrá›num var kelda í samrø›uni.

Jóanes Dalsgar›, stjóri á Føroya Jar›arrá›i, vendi sær til bla›mannin, beint eftir, at bla›i› var komi› út og gjørdi vart vi›, at ein lítil misskiljing var íkomin okkara millum.

Væl er ta› trupult at koyra kraftfó›ur til fjósi›. Men ta›, sum Jar›arrá›i› leg›i mest í var, at als einki hoyggj ella súrhoyggj yvirhøvur er í Fámara. Tí var› avgjørt at taka neytini úr fjósinum og flyta tey a›rasta›ni í Su›uroy.

*Savnsmynd*




DAGFØR
TEG
Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum
sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, soført tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.
sosialurin



Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Live music
Club KAGGIN
Fríggja-og leygarkvøldið spælir
MOON-SHOT
5'ARI
frí.-, leyg.- og sunnukvøld frá kl. 17.00
BINGO
verður leygarkvøldið!
Kaggin
Kaggin
Kaggin
Sosialurin - 311820
www.kaggin.fo

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

fk Mat-seðilin
Hósdagin 21. sept.:
Kalkunsnitzel
Fríggjadagin 22. sept.:
Lambakotelettir
Leygardagin 23. sept.:
Cuvettesteik
Mánadagin 25. sept.:
Millionbúff
Týsdagin 26. sept.:
Fiskarond
Mikudagin 27. sept.:
Stokt flesk
Kostnaður 32,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Lesið
sosialin
sosialin
sosialin
-tað loysir seg

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

Eysturoy

ARIA
Á KAMBSDALI
Stórt dansikvøld verður á Kambsdali leygarkvøldið 23. sept.
ARIA spælir

STRÁLAN

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur verður leygarkvøldið 23. sept.
HJARNAR spæla
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY


Vilja tygum vi› í

**Í b‡in** - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur